## Fólkaatkvøða um loysing útsett til í heyst

Eitt uppskot um at áseta ein dag fyri fólkaatkvøðu í Grønlandi um loysing er útsett til í heyst.

Per Rosing Petersen, sum umboðar Siumut í grønlendska Landstinginum, hevur skotið upp at áseta ein dag, tá grønlendingar skulu á fólkaatkvøðu um at loysa frá Danmark.

Men uppskotið kemur ikki til viðgerðar nú. Ístaðin hevur landsstýrið lovað at taka uppskotið framaftur, tá Landstingið hevur fingið álitið frá sjálvsstýrisnevndini. Tað verður einaferð í heyst.

Per Rosing Petersen sigur við grønlendska útvarpið, at seinastu tíðina hevur danska stjórnin lagt stóran dent á at halda samtykt nummar 1441 hjá ST um Irak, og tí heldur hann, at Danmark eisini eigur at leggja seg eftir at halda ta 55 ára gomlu ST-samtyktina um sjálvsstýri til hjálond.

## Kann beina burtur fiskabein



Savnsmynd

Norskir granskarar hava ment eina maskinu, sum kann tryggja, at fiskaflak veruliga er beinfrítt.

Higartil hava fiskavirkini nýtt maskinur, sum taka ryggin úr fiskinum, men kortini hevur verið neyðugt at lata fólk reinskera flakið fyri at fáa tey seinastu beinini burtur. Nú hevur Fiskeriforskning í Tromsø gjørt eina maskinu, sum ger ta handaligu reinskeringina óneyðuga. Tann nýggja maskinan tekur sjálv tey seinastu beinini úr flakinum, og til tess at tryggja, at einki bein er eftir, verður hvørt einasta flak kannað við røntgentóli.

Men vandi er í hvørjari vælferð, og soleiðis er eisini við hesari nýggju tøknini, tí í fiskiídnaðinum eru fólk greið yvir, at tann nýggja maskinan fer at beina fyri fleiri arbeiðsplássum á flakavirkjunum.

## Høgur oljuprísur gav stórt avlop

Noreg hevði góðar 20 milliardir krónur í avlopi á handilsjavnanum í februar. Tað var 27 prosent meiri enn í sama mánað í fjør, og munurin stavar frá tí sera høga oljuprísinum.

Noreg útflutti í februar vørur og tænastur fyri 41,3 milliardir krónur. Av hesum stavaðu 19 milliardir frá oljuútflutninginum ella 4,6 milliardir meiri enn í februar í 2002. Nøgdin var kortini tann sama í februar í ár sum í sama mánað í fjør, men meðan norðmenn fingu 176 krónur í meðal fyri tunnuna í februar í 2002, fingu teir 232 krónur í meðal fyri tunnuna í síðsta mánað.

# Jákup B nýggja caising við brúgv

**Fríggjadagin seinnapartin var sjálv caisingin við byrjanini til brúnna koyrd út úr høllini á Skarðhamri, sum bátasmiðurin Kjartan Hansen úr Klaksvík leigar**

BÁTASMÍÐ
*Solby A. Eliasen*



*Sjálv caisingin til Jákup B er nú liðug, og fríggjadagin varð hon koyrd út í tún, tí ikki er pláss fyri henni inni, meðan arbeiðið upp á sjálva brúnna verður gjørt*

**Klaksvík:** Ein stórur trailari varð nýttur til at fáa caisingina útum. Arbeiðið hevur staðið upp á síðani í oktobur í fjør, og nú verður so farið í holt við at byggja sjálva brúnna inni í høllini, meðan hitt verður standandi uttanfyri. Gongst sum ætlað, so verður arbeiðið liðugt í mei. Og skal tað setast upp á skipið. Tað arbeiðið væntar Kjartan verður liðugt í oktobur, so tilsamans kemur arbeiðið at vara í eitt ár. Og hetta arbeiði er so mikið umfatandi, at tað er nóg mikið hjá fimm monnum í eitt heilt ár, so hjá Kjartan og hansara monnum er nóg mikið at gera fyri tíðina og í eitt hálvt ár fram.

Ein stuttlig søga er tengd at hesum, at caisingin skuldi fáast útum, so arbeiðið upp á sjálva brúnna kundi byrja.

Eigarin av høllini, Jógvan Hansen, hevur longi havt eitt ynski um at gera hurðina til høllina størri til sítt virksemi. Upprunaliga var henda høllin nýtt til galvaniseringsvirksemi, og til tílíkt er ikki neyðugt við so stórum hurðum, men nú er annað virksemi har, og tí eitt ynski um at gera hurðina størri.

Og nú vildi tað soleiðis til, at tað varð gjørt í sama viðfangi sum at caisingin skuldi út. So hurðargapið varð økt so mikið, at caisingin eisini kundi fáast út við einum trailara. Kjartan Hansen greiðir smáflennandi frá, at onkur hevði verið inni í høllini, meðan teir bygdu, og hevði so spurt, hvussu teir ætlaðu at fáa hetta stóra byggiverkið útaftur, tí tað var eyðsæð fyri ein og hvønn, at tað ikki fór at ganga ígjøgnum hurðina, sum hon var.

Tá lótust teir onkuntíð, sum um teir ikki høvdu hugsað um tað, og tað bleiv ofta skemtað við.

– Men, men vit høvdu ikki bygt okkum inni, sigur Kjartan skemtandi.

Arbeiðið upp á at skifta caising og brúgv á Jákup B byrjar væntandi í mei mánaði, og skipið skal eftir tíðarætlanini verða siglingarklárt aftur í oktobur.

# Bestesdakórið gevur fløgu út

**Betesdakórið úr Klaksvík er farið undir at taka eina fløgu upp. Á fløguni verða 12 ella 14 andaligir sangir. Hon kemur væntandi út einaferð í móti sumri**

FLØGUÚTGÁVA
*Solby A. Eliasen*



*Betesdakórið fer at koma við eini fløguútgávu, tá tað líður longur út á várið*

*Mynd: Høgni Thomsen*

**Klaksvík:** Fløgan verður upptikin í Betesda. Jónheðin Tróndheim skal taka sær av upptøkuni. Jógvan við Keldu, kórleiðari, sigur, at hann hevur roynt fleiri høli til kór, men hann heldur, at salurin í Betesda hevur ta bestu klang-javnvágina. Onkrir sangir verða uttan ljóðføri, og summir verða við klaverfylgispæli. Eisini verður onkur við urguspæli afturvið. Tað verður ikki alt kórið, sum telur eini 65 fólk, sum syngur allar sangirnar. Onkur solo, trio og kvartett verður eisini.

– Hetta verður gjørt fyri at geva útgávuni eina vissa breidd, greiðir Jógvan við Keldu frá. Men hann leggur afturat, at tey ætla ikki at geva nakað annað, enn tað tey eru kend fyri, út.

– Tey, ið ynskja at keypa fløguna, skulu kenna seg aftur, sigur hann, og her hugsar hann serliga um limirnar í samkomuni, sum sjálvsagt hoyra mest til kórið.

Betesdakórið hevur virkað á hvørjum ári síðani 1926, og tað er eyðkent fyri teirra avbera vakra og góða sang. Kórið hevur ikki givið nakað út, síðani tey í 1964 og 1966 góvu út plátur. So nú má sigast, at tað er upp á tíðina. Men Jógvan við Keldu sigur, at hetta kemur fyrst og fremst av manglandi orku.

– At geva eina tílíka fløgu út krevur nógva tíð og orku. Tí tað er sanniliga ikki á hvørjum degi, at eitt kór gevur eina fløgu út, og tí torir ein illa at fara undir tað. Eg trúgvi eisini, at mong eru rættiliga svong eftir eini tílíkari fløgu. Og tískil fylgir eitt vist krav um góðsku við eisini, sigur Jógvan, sum tó væntar, at ein tílík fløga fer at verða væl móttikin.



# Tung byrða



*Hóast teinurin millum Eystaru og Vestaru bryggju í Havn ikki er serliga stórur, so er tørvur á einum stórum skipi, tá rampan til atløgubrúnna hjá nýggju Norrønu skuldi flytast.*

*Mynd: Jens Kristian Vang.*

**Simone J hjá Skipafelagnum flutti týsmorgunin rampuna til nýggju Norrønu av Vestaru bryggju til Eystaru bryggju**

BYGGING
*Heri á Rógvi*

Tað er bara sum at siga tað, at gera klárt at taka ímóti nýggju Norrønu. 10. apríl kemur nýggi stoltleikin í føroyska ferðaskipaflotanum á Havnina fyri fyrstu ferð, og allar árar verða settar í sjógv fyri at gera klárt at taka ímóti.

Týsmorgunin skuldi rampan flytast av Skipasmiðjuni yvir á Eystaru bryggju, har Norrøna og nýggja Suðuroyarskipið í framtíðini fara at leggja at.

Við Simone J, sum Skipafelagið hevur leigað, var rampan til nýggju Norrønu. Rampan kom í tveimum stykkum, ið hvørt vigaði fjøruti tons. Ein bjálki varð eisini lagdur nakað fyri, og hesin vigar 30 tons. Sostatt vigar rampan við bjálka 110 tons í alt.

Tað er Pihl og Søn, sum ger arbeiðið á Eystaru bryggju í sambandi við nýggju atløgubrúnna. Rampuna hevur Tórshavnar Skipasmiðja staðið fyri at gera.

Nýggja rampan kann nýtast til nýggju Norrønu, Smyril og til nýggja Suðuroyarskipið, tá eftir ætlan fer undir sína sigling millum Suðuroynna og høvuðsstaðin á heysti í 2004. Ein skipan, ið nýtir hydralik, ger, at rampan kann setast alt riggast til tey ymsu skipini.

Sum tað eisini sæst á myndini, so er tað ikki bara sum at siga tað at fáa flutt tílíkt. Men hóast byrðan var tung, so verður latið væl at, og byggingin kann halda fram ótarnað.

Simone J er tað einasti skipið hjá Skipafelagnum, sum er tøkt til tílíkar uppgávur í løtuni, tí hini skipini jú eru rakt av verkfalli.

Á myndini sæst eisini, at stóri kranin hjá Tórshavnar Skipasmiðju eisini var komin fyri at hjálpa til.

### Liðugt í summar

Havnameistarin hjá Tórshavnar havn, Jónsvein Lamhauge, sigur, at arbeiðið at gera klárt til nýggju Norrønu gongur sum tað skal.

– Tað verður ikki heilt liðugt alt, tá Norrøna kemur 10. apríl, men rampan er klár, og bilar fara at kunna koyra í land og umborð, sigur Jónsvein Lamhauge.

Tað er serliga asfalteringin, sum fer at mangla í 10. apríl, men hetta skuldi kortini ikki gjørt tað heilt stóra, heila havnameistarin.

Atløgubryggjan er bert ein partur av arbeiðinum í sambandi við at gera Eystaru bryggju klára til at taka ímóti nýggju Norrønu.

Ein stórur partur av bygninginum hjá Farstøðini, har Farmaleiðir hava hildið til, verður í løtuni tikin niður fyri at gera fleiri parkeringspláss.

Alt hetta verður heldur ikki liðugt 10. apríl, og tað er aftur serliga asfalteringin, ið ikki verður klár.

– Tá summarsiglingin fer at byrja, verður væntandi alt klárt, sigur Jónsvein Lamhauge.

### 3 tímar áðrenn

Nýggja Norrøna tekur upp ímóti míggjuhundrað bilar, men á Eystaru bryggju er bert pláss fyri umleið 250.

Og tað verða heldur ikki gjørd fleiri pláss. Ístaðin er ein ætlan gjørd, har bilar skulu koyrast umborð nakað væl áðrenn skipið fer.

– Vit ætla at byrja at koyra umborð einar tríggjar tímar áðrenn, og hetta er ríkiligt av tíð. Vit fara at lata fleiri lúkur upp, soleiðis at bilarnir verða avgreiddir skjótt, sigur Jónsvein Lamhauge.

Roknast kann ikki við fullum skipi hvørja ferð, men eftir hvat skilst er áhugin sera stórur fyri fyrsta túrinum, og tá fæst at síggja, hvussu nýggja skipanin fer at roynast, og hvussu raskir føroyingar eru at møta rættstundis og í góðari tíð.

VARPIÐ
20 síður heft, - so tað heldur alla vikuna
Skráir og ummælir
Hvønn fríggjadag
SvF • DR1 • DR2 • BBC Prime • Canal+ • Canal+ Gul • Canal+ Blá • TV Danmark 1 • TV Danmark 2 • 3+ • DK 4 • TV 1000 • TV3 dk
Animal Planet • BBC World • CNN • Cartoon Network • Discovery Channel • Euro Sport • MTV • National Geographic
TCM • Travel Channel • VH1 • TV2 Zulu • GOD Channel • Lindin • Útvarp Føroya • Rás 2

Magistarafelagið:

# Vilja hava greið boð um setanir

**Magistarafelagið spyr løgmann, hvat felagið skal halda seg til í málinum um setanina av nýggjum landsantikvari. Magistarafelagið leggur málið fyri Løgtingsins umboðsmann í vikuni**

LANDSANTIKVARUR
*Heri á Rógvi*



*Kate Sanderson, formaður í Magistarafelag Føroya, sigur, at felagið fer at leggja málið um landsantikvarin fyri Løgtingsins umboðsmann seinni í vikuni*

Magistarafelagið Føroya fer í vikuni at leggja málið um setanina av nýggju landsantikvari til Løgtingsins umboðsmann.

Løgtingsins umboðsmaður fer hereftir at savna øll viðkomandi skjøl í málinum, og hann ger seinni eina niðurstøðu. Joen H. Andreassen, Løgtingsins umboðsmaður, hevur áður sagt við Sosialin, at hansara heimildir í málinum eru at gera eina niðurstøðu útfrá kanningum, men hann kann ikki gera annað at mæla til, og hevur tískil ongan myndugleika at ógilda setanina.

Nevndin í Magistarafelagnum arbeiðir í løtuni við at orða eitt skriv til Umboðsmannin, og tað verður væntandi sent avstað seinni í vikuni, upplýsir Kate Sanderson, formaður í Magistarafelag Føroya.

Magistarafelagið sendi í farnu viku løgmanni eitt skriv. Hetta var eftir, at Høgni Hoydal, landsstýrismaður í mentamálum, boðaði felagnum frá, at hann ikki fór at gera nakað við broyta setanina av Steffen Stummann Hansen sum landsantikvar.

Í skrivnum/brævinum til løgmann sigur Magistarafelagið, at felagið ynskir at fáa at vita, hvat felagið, sum felag hjá alment settum starvsfólkum, hevur at halda seg til í hesum málinum. Felagið metir, at boðini frá løgmanni og Høgna Hoydal er mótstríðandi, og tískil verður ynskt, at løgmaður meldar út.

So vítt vit vita, hevur løgmaður ikki svarað Magistarafelagnum aftur enn.

### Brævið

Brævið frá Magistarafelagnum til løgmann er stutt, so vit prenta tað her í fullum líki. Brævið er dagfest 13. mars 2003, og formaðurin í Magistarafelagnum, Kate Sanderson, hevur undirskrivað brævið. Og tað er soljóðandi:

"Eftir at svar nú er komið frá Høgna Hoydal til teir spurningar Magistarafelag Føroya hevði sett í sambandi við setan av landsantikvari, kenna vit okkum í nevnd felagsins í villareiði um tey eftir okkara tykki grundleggjandi mál, ivi hevur staðist av í sambandi við hesa setan.

Tú hevur sum løgmaður við evstu ábyrgd í starvsfólkamálum landsins klárt og skilliga sagt tína meining um hetta setanarmál og hevur tikið eitt avgerðandi stig í hesum sambandi. Í svarinum frá setta landsstýrismanninum í mentamálum hava vit fingið eini heilt onnur og eftir okkara tykki mótstríðandi boð.

Vit vilja tí venda okkum til tín fyri at spyrja, hvat vit sum felag hjá alment settum starvsfólki hava at halda okkum til í hesum máli."